# Bygdamenn við blikkum og brandi

**Í nógvum bygdum verður gjørt nógv burtur úr nýggjársháldinum. Í Vestmanna og á Eiði er vanligt, at menn, ið dáma at spæla við eld, seta blikk upp, fyri at fríðka um bygdina um ársskiftið**

NÝGGJÁRSHALD
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Vágsbygd hevur leingi verið kend sum nýggjársbygd burturav, men tað er ikki bara har, at nógv verður gjørt burturúr nýggjárinum. Á Eiði og í Vestmanna verður nevniliga eisini nógv gjørt burturúr, og í øðrum bygdum er eisini soleiðis, men um hetta ársskiftið var Sosialurin á Eiði og í Vestmanna og fylgdi við, hvussu gjørt verður við blikkunum í teimum bygdunum.

## Vestmannasjakk

Í Vestmanna hevur leingið verið gjørt nógv burturúr nýggjársháldinum. Millum 1500 og 1800 blikk verða á hvørjum árið sett upp í Vestmanna, og har verður bygdin býtt upp í fýra bólkar, ella sjakk, sum teir sjálvir nevna tey.

Vit hava fylgd sjakkinum á Miðalsbrekku í Vestmanna. Har verður vanliga fari í arbeiðshølini hjá kommununi, har blikkini, sum børn hava savnað inn framman undan, verða holaði og pappírið skrætt av teimum. Eisini verður klútur lagdur í blikkini tá. Tað, sum verður nýtt til klút, er ofta gamlar undirtroyggjur og líknandi.

Seinnapartin fara menn at seta blikkini upp, og fylla olju á tey.

Í Miðalsbrekku hava teir ábyrgdina av 350 blikkum, sum verða sett upp á Miðalsbrekku og eitt sindur útum.

Samstundis, sum blikkini verða holaði, verður vanliga eitt ræst krov sett útá. Tá manningin hevur sett blikkini upp, far øll manningin sær ein bita, og tá etið er, fer manningin til hús at vera saman við familjunum.

Um kvøldið, umleið ein tíma fyri midnátt, verður eldur settur á blikkini í Vestmanna. Fyri at festa í verður ein kyndil nýttur, og bensin er latið í blikkini fyri skjótari at fáa eld á. Tað eru vanliga eini 20 fólk, ið luttaka í sjakkinum á Miðalsbrekku.

Í Vestmanna hava teir, sambært Birgiri Waag Høgnesen, ein av fyriskiparunum, sett blikk upp á hvørjum árið síðan 1953.

## Eiði

Á Eiði er eisini vanligt við blikkum, og vanliga verða øll blikkini sett upp, ið børn í bygdini megna at samla saman. Í ár vóru eini 500 blikk, men onkuntíð um ár 2000 vóru upp í 1200 blikk, so ein ávís afturgongd hevur verið.

Á Eiði fer mann vanliga kvøldið fyri gamlaárskvøld at seta hol á blikkini. Hetta tekur vanliga ikki so langa tíð, tí menn er hugagóðir. Á Eiði verður pappírið ikki skrætt av blikkunum.

Seinnapartin nýggjársaftan fara hesir somu aftur til verka. Tá skulu kyndlar gerast, og tvist skal eisini koyrast í blikkini, áðrenn olju verður latin í tey.

Tveir tímar fyri midnátt møtast allir aftur, og síðani vera blikkini sett upp. Tey verða sett úteftir grótkastinum, niðan á demningin hjá SEV við Eiðisvatn, suður til myllánna og niðan á leitið norðanfyri bygdina.

Tá klokkan nærkast midnátt fara hesir somu 12-15 menninir í gongd við at festa í blikkini, og vanliga passar tað seg soleiðis, at fest verður í seinastu blikkini á midnátt.

Tá verður bálið, sum í ár ikki var so stórt, tendra. Fyrr var heilt nógv gjørt burturúr bálinum. Dreingirnir í bygdini plagdu at vera raskir at fara við lastbilunum, ið savna brenni, fyri at hjálpa eitt sindur til. Men hetta er sambært Eiðismonnum ein farin tíð.

- Eg skal ikki siga, at vit byrjaðu at savna inn í januarmánaði til bálið, men heystfjøllini vóru ikki farin afturum bak, tá vit byrjaðu at savna brenni, sum vit goymdu til bálið, greiðir ein teirra frá.

Á Eiði hevur tað síðan ár 2000 verið soleiðis, at Eiðis Bóltfelag skipar fyri einum nátturðabita, tá klokkan er farin nakað av midnátt. Soleiðis var eisini í ár, og nógv var sungið, áðrenn fólk fóru heim.



*Á Eiði sær tað soleiðis út beint eftir midnátt*
*mynd: Sjúrður Nielsen*



*Janus Haraldsen og Jónleif Mørkøre eru nøgdir eftir at hava fest í. Bálið er tó ikki so stórt*
*Mynd: Sjúrður Nielsen*



*Blikkamenninir á Eiði eru klárir at fara til verka*
*Mynd: Tummas Súni Joensen*



*Í Vesmanna eru sanniliga nógv blikk*
*Mynd: Birgir Waag Høgnesen*



*Børnini í Vestr*